# Statsraad Lehmkuhl



**Fyrsta fremmanda seglskipið í ár hevur vitjað í Havn um summarmálatíð**

SKIPSVITJAN
*Edvard Joensen*

Fyrsta fremmanda seglskipið í ár hevur verið og vitjað. Tað var norska skúlaskipið Statsraad Lehmkuhl, sum kom til Havnar mikukvøldið og fór avstað aftur seinnapartin hósdagin.

Av havnarskrivstovuni í Havn verður sagt, at skipið eftir ætlan kemur aftur einaferð seinni í summar.

Skipið, sum kom úr Noreg fór aftur til Noregs við teimum umleið 140 fólkunum umborð, har nógv tey flestu eru næmingar. Fasta manningin telur 22 fólk.

Statsraad Lehmkuhl er barkriggað skúlaskip. Tað størsta í Noreg. Skipið hevur eina totallongd, við sprydinum, upp á 98 metrar. Sjálvur skrokkurin er 84,6 metrar langur. Skipið er merkt 1.516 BT.

Statsraad Lehmkuhl varð smíðað í Bremerhaven-Geestemünde og æt tá »Grossherz og Friedrich August«.

Eftir fyrra heimsbardaga tóku bretar skipið sum herfong, og í 1921 kom skipið til Bergen og hevur verið norskt síðan. Tó tóku týskarar skipið aftur frá norðmonnum undir seinna heimsbardaga og nevndu tað tá »Westwärts«.

Í dag er tað grunnurin Statsraad Lehmkuhls Venner, sum eigur og rekur skipið.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sóglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk og regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin strúkur í vindi av landsynningi og regn av og á. Sunnudagin minni vindur og møguliga turt. Hitin millum 7 og 11 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -5 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 11 |
| Tromsø | 5 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 17 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 14 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 26 |
| New York | 10 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 985 hPa. vestan fyri Lofoten fer spakuliga í landnyrðing og grynnist. Ein hátrýstryggur sunnan fyri Ísland verður yvir Føroyum fríggjadagin.




**Í dag:**
Hátrýstið við Føroyar fer spakuliga eystureftir. Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar sunnunáttina.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/4 kl. 06⁰⁰– 14/4. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,8°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 13/4 kl. 06⁰⁰– 14/4 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 64,0 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin


## VESTFALLSKYRRINDI

15. apríl

8. apríl Tendring
16. apríl Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15.apríl | 00.12 | 12.38 | 11.38 | - | 11.53 | - | 02.12 | 14.38 | 03.12 | 15.38 | 10.53 | 23.19 | 09.53 | 22.19 | 00.27 | 12.53 | 01.27 | 13.53 | - | 12.23 | 01.12 | 13.38 |
| 16.apríl | 01.04 | 13.42 | 00.04 | 12.42 | 00.19 | 12.57 | 03.04 | 15.42 | 04.04 | 16.42 | 11.57 | - | 10.57 | 23.35 | 01.19 | 13.57 | 02.19 | 14.57 | 00.49 | 13.27 | 02.04 | 14.42 |
| 17.apríl | 02.20 | 14.54 | 01.20 | 13.54 | 01.35 | 14.09 | 04.20 | 16.54 | 05.20 | 17.54 | 00.35 | 13.09 | - | 12.09 | 02.35 | 15.09 | 03.35 | 16.09 | 02.05 | 14.39 | 03.20 | 15.54 |
| 18.apríl | 03.29 | 15.49 | 02.29 | 14.49 | 02.44 | 15.04 | 05.29 | 17.49 | 06.29 | 18.49 | 01.44 | 14.04 | 00.44 | 13.04 | 03.44 | 16.04 | 04.44 | 17.04 | 03.14 | 15.34 | 04.29 | 16.49 |
| 19.apríl | 04.10 | 16.29 | 03.10 | 15.29 | 03.25 | 15.44 | 06.10 | 18.29 | 07.10 | 19.29 | 02.25 | 14.44 | 01.25 | 13.44 | 04.25 | 16.44 | 05.25 | 17.44 | 03.55 | 16.14 | 05.10 | 17.29 |

5 707265 100050 >